# Síggja veruleikan í eyguni

**Nú síggja føroyingar endiliga veruleikan í eyguni á hernaðarliga økinum, sigur løgmaður**

HERNAÐAR-SAMTYKTIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nú kunnu vit síggja veruleikan í eyguni.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er væl nøgdur við hernaðarsamtyktirnar, sum løgtingið endaliga samtykti mikudagin, seinasta dagin, áðrenn tað fór í summarfrí.

Hann sigur, at nú kunnu føroyingar viðgera hernaðarmálini út frá veruleikanum.

– Hernaðarsamtyktirnar, sum hava verið í gildi, vóru gjørdar útfrá tíðini, sum tá var. Men tær vóru gamlar og heimurin er nógv broyttur, síðani.

Men Løgmaður heldur eisini, at tær samtyktirnar førdu til, at føroyskir myndugleikar vórðu heilt settar út á eitt síðuspor uttan at hava nakra sum helst ávirkan á okkara egnu viðurskifti.

– Tær gomlu hernaðarsamtyktirnar staðfestu, at Føroyar skuldu vera uttanfyri allar hernaðarligar samgongur.

Og hóast Føroyar skuldu vera uttanfyri allar hernaðarligar samgongur, hevur veruleikin verið ein heilt annar, tí vit hava jú alla tíðina verið ein partur av NATO.

– Sostat hevur landsstýrið altíð havt eina støðu, sum hevur verið í stríð við veruleikan.

## Føroyingar púra avskornir

Løgmaður sigur, at samtyktin, sum segði, at vit skuldu vera uttanfyri hernaðarsamtyktir, hevur í veruleikanum ført við sær, at landsstýrið heilt avskorið frá at viðgerða hernaðarmál og trygdarmál.

Sostatt kundi landsstýrið als ikki so frægt sum viðgera teir fyrispurningar, tað fekk.



*Í nógv ár hava vit stungið høvdið í sandin á hernaðarliga økinum, men nú skulu vit síggja veruleikan í eyguni*

– Men hernaðarsamtyktirnar førdu eisini við sær, at føroyskir myndugleikar í alt ov lítlan mun vóru kunnaðir um tað, sum hendi á hesum øki og sum hevði týdning fyri okkum.

Kortini staðfesta bæði bæði Reyðabók og Svartabók, at tá ið viðurskifti viðvíkjandi Føroyum vóru á skránni, varð løgmaður kunnaður viðhvørt.

– Men løgmaður mátti hava hesa vitan fyri seg sjálvan og tí hann hevði ikki heimild at kunna sítt egna landsstýri, ella løgtingið um tað, hann visti.

– Og annars gjørdi tað ikki mun, hvat løgmaður segði, tí tær ætlanir, sum vóru í umbúna í Føroyum, vórðu settar í verk, sama, hvat løgmaður segði.

## Stinga ikki høvdið í sandin

Jóannes Eidesgaard sigur, at nýggja hernaðarsamtyktin er ein uppgerð við tað støðuna.

Nýggja samtyktin ber í sær, at føroyingar alment viðurkenna veruleikan, sum hann er, nevniliga, at vit, ígjøgnum ríkisfelagsskapin, eru ein partur av einum størri verju og trygdarpolitiskum høpi, antin vit vilja ella ikki.

– Tá ið vit kortini eru ein partur av eini størri heild, kunnu vit akkurát tað sama royna at fáa sum frægast burturúr.

Løgmaður ásannar, at tjóðveldisflokkurin er ímóti, at hernaðarsamtyktin viðurkennur, at verjupolitikkur er danskt ábyrgdarøki.

– Tað er rætt. Men tað hevur altíð verið galdandi. Og skal tann støðan broytast, so mugu vit taka loysing. Fyrrenn tá, kann verju- og trygdarpolitikkur ikki vera føroyskt ábyrgdarøki.

– Men veruleikin er eisini, at tað verður altso ikki við tað fyrsta, at vit taka loysing.

– Og ístaðin fyri at stinga høvdið í sandin, sum tjóðveldisfólk hava gjørt alla tíðina, er samgongan sinnað til at royna at fáa tað besta burturúr undir teimum umstøðum, sum eru.

Jóannes Eidesgaard sigur, at nýggja samtyktin ber í sær, at føroyskir myndugleikar skulu hoyrast og skulu hava møguleika at ávirka avgerðirnar, tá ið ætlanir viðvíkjandi Føroyum eru á skránni.

– Umframt at gera støðuna greiða á økinum, er endamálið eisini at gera føroyskar politikarar virknar, tá ið tað snýr seg um trygdar- og verjupolitikk á føroyskum landøki, sjóøki og luftøki, sigur løgmaður.






# Føroyingar ferðast í Føroyum

**Ferðaráð Føroya roynir seg við átøkum, sum skulu fáa føroyingar at ferðast meira í Føroyum. Fleiri fylgjandi átøk verða seinni í summar, sigur Ferðaráðið**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Tað er skilagott av føroyingum at halda sína feriu í Føroyum, sigur Per Hanen, varastjóri á Ferðaráð Føroya. Pengarnir, fólk leggja eftir seg, koma fleirfaldir aftur, vísir hann á.

Í fyrsta lagi fáa tey, sum selja vørur ella tænastur til føroyingar, vinning burturúr. Í øðrum lagi eru føroyskir pengar, brúktir í Føroyum, vunnir dupult aftur í mun til, um teir vórðu brúktir uttanlands, sigur varastjórin á Ferðaráðnum.

Ferðaráðið hevur seinnu árini havt átøk, har dentur verður lagdur á at fáa føroyingar at ferðast í Føroyum. Eitt nú við framsýningum og messum, eins og nú eisini faldarar verða gjørdir, sum lýsa møguleikarnar at ferðast bæði til gongu og nú seinast eisini á súkklu.



*Gongutúrar á føroysku fjøllunum standa mát við mestsum alt, sum síggjast kann av náttúru uttanlands. Júst tí, at lendið er so nakið, og eingi trø og skógir fjala foldina, sæst hvør lág, hvør túgva og hvør skuggi, sum lendið leggur. Alt er livandi*

*Mynd: Edvard Joensen*

Á messuni, sum var í SMS í seinastu viku, varð ein nýggjur súkklufaldari framlagdur, eins og gongufaldarin, sum fyrr er komin út á enskum og donskum, eisini varð givin út á føroyskum.

Hetta er eisini eitt átak fyri at røkka føroyingum, sigur Per Hansen, varastjóri á Ferðaráðnum.

Hann sigur, at onkur uppfylging av tí, sum higartil er gjørt, verður seinni í vár ella summar. Heilt nágreiniliga kann hann tó ikki siga, hvat tað verður, men tað verður so gjørt í framhaldi av arbeiðinum at fáa føroyingar at støðast her heima í síni frítíð, sigur hann.

Um faldararnar, sum givnir eru út, sigur Per Hansen, at hetta er ein byrjan. Tað skal gerast væl meira við at vísa á gøtur og túrar, sum gangast kunnu.

Umráðandi er, um gerast skal ordiliga burtur úr gongutúrum, at umstøður sum góðar gøtur at ganga eftir, eru í lagi.

Tað er ikki bara at fara í hagan, tí fleiri avmarkingar liggja við. Loyvt er í grundini bara at ganga eftir merktum bygdagøtum, um ikki annað nágreiniligt loyvi er fingið. Og ikki er altíð ráðiligt hjá hvørjum sum helst at fara ókendur í hagan.

Per Hansen, sigur, at tað er við at síggjast aftur í hagtølunum, at føroyingar eisni eru farnir at brúka meira av síni frítíð heima á landi.

Serliga eru tað gistingarhúsini, sum siga frá fleiri føroyskum gestum, vísir hann á. Hann sigur eisini, at tað skilst á eitt nú kunningarstovunum, at fleiri og fleiri eisini leiga sær frítíðarhús kring landið. Men hesi hagtølini ber enn ikki til at fáa frá Hagstovuni, sigur hann.

# Nýggjur tónleikur

Sagt verður frá, at frálíkur og einanstandandi kórtónleikur verður at hoyra um vikuskiftið. Tað er Sunleif Rasmussen, sum leiðir kórið Tarira á konsertferð í Føroyum. Konsertirnar verða hildnar í fýra ymiskum kirkjum kring landið.

Næsta konsertin hjá Tarira verður í Gøtu kirkju nú sunnudagin 23. mai kl. 16.00. Á skránni eru trý verk, sum ikki eru framførd áður í Føroyum. Talan er um eitt verk eftir Robert Whyte og tvey verk eftir Arvo Pärt.

Fýra tónleikarar eru við á konsertferðini í Føroyum: Sámal Petersen, violin; Nicolas Kapnas, bratsch; Jens Christian Guttesen, cello, og Heðin Kambsdal, orgul.

Tað er Sunleif Rasmussen sjálvur, sum hevur sett á stovn kórið Tarira. Sunleif stjórnar kórinum, og hann hevur útbúgving frá Det Kongelige Danske Musikkonservatorium. Hann hevur millum annað vunnið Tónleikavirðisløn Norðurlandaráðsins, og er hann sera virkin innan føroyskt tónleikalív.



*Føroyska tónaskaldið Sunleif Rasmussen er kórleiðari hjá Tarira, sum í hesum døgum er á konsertferð kring oyggjarnar*

Hinar konsertirnar hjá Tarira verða í Húsavíkar kirkju tann 28. mai og 31. mai í Vesturkirkjuni. Ein konsert hevur longur verið, nevniliga í Sandavági, og sagt varð frá einum tiltakið, sum var væleydnað. Konsertirnar vara ein tíma uttan steðg og eru ókeypis.

**hkm**

# Nýggjur professari

Mikudagin tók Malan Marnersdóttir alment við sum professari á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

– Eg havi altíð roynt at arbeitt miðvíst ímóti góðum úrslitum. At vera framsøkin er bæði spennandi og avbjóðandi. Tað er altíð gott at seta sær nøkur mál og vita, um tú røkkur teimum, sigur Malan Marnersdóttir. Malan Marnersdóttir er 52 ára gomul, og hon hevur verið á Fróðskaparsetri Føroya síðani 1983. Seinastu seks árini hevur hon verið rektari á Fróðskaparsetrinum.

Móttøka var á Føroyamálsdeildini mikudagin, tá Malan Marnersdóttir varð tilnevnd professara. Tað var Jóan Pauli Joensen, vararektari, sum handaði henni professarabrævið.

Malan Marnersdóttir, professari, helt fyrilestur við heitinum »leita og tú skalt finna.«

Malan segði í viðtalu við Sosialin seinasta leygardag, at uppgávan hjá henni verður at røkja arbeiðið so væl sum yvirhøvur gjørligt.

– Eg skal nú fyrst og fremst royna meg sum professara. Tað arbeiðið inniheldur fleiri nýggj øki, sum eg eri noydd at tillaga meg til, sigur Malan Marnersdóttir, nýtilnevndur professari.



*- Eg havi altíð roynt at arbeitt miðvíst ímóti góðum úrslitum, sigur Malan Marnersdóttir, sum nú kann skriva »professari« á visitkortið*

**hkm**